# Mentanarvika í Runavík

**Í sambandi við altjóða vinnuráðstevnuna Faroexpo 2005, sum verður í Runavík síðst í komandi mánað, skipar Runavíkar kommuna fyri mentanarviku somu dagar**

MENTAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit nakað um skránna fyri altjóða vinnuráðstevnuna, sum verður í Runavík um ein góðan mánað. Tá ið stigtakararnir til ráðstevnuna fóru í gongd við fyrireikingarnar, var tað skjótt, at Runavíkar Kommuna lá framvið, og kommunan hevur gjørt av at gera eina mentanarviku í sambandi við ráðstevnuna.

### Størri uppliving til borgararnar

Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, sigur, at kommunan tók stig til mentanarvikuna, tá ið teir frættu um ráðstevnuna, og at mentanartiltøkini verða gjørdi fyri at gera karmarnar kring Faroexpo eitt sindur meiri litríka.

- Vit skipa fyri hesi mentanarvikuni, soleiðis at borgararnir í Eysturoynni fáa eina enn størri uppliving burtur úr hesi ráðstevnuni, og á henda hátt royna vit at seta okkara dám á Faroexpo, sigur Rodmund ur Nielsen.

Borgarstjórin greiðir frá, at kommunan í sambandi við mentanarvikuna hevur boðið fleiri listarfólkum úr vinarbýunum hjá Runavík at koma til Føroya at sýna fram, spæla tónleik ella hvat, ið tey nú einaferð fáast við.

- Vit royna at fáa so breiða umboðan sum gjørligt, men tá ið tú fæst við altíð langa tíð at fáa skránna endaliga upp á pláss, og soleiðis er eisini í hesum førinum, sigur Rodmund Nielsen. Hann sigur, at ein fyribilsskrá er gjørd, men tað legst allatíðina afturat, og endaliga skráin verður neyvan tøk fyrr enn beint undan vikuni.



*Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, sigur, at kommunan hevur skipað fyri mentarnarvikuni í eini roynd at gera karmarnar kring Faroexpo 2005 meiri litríkar.*
*savnsmynd*

Millum tey tiltøk, ið tó eru fastløgd fyri mentanarvikuna, eru eitt nú málningaframsýning, útisjónleikur og klassisk konsert.

### Umráðandi við virknum vinnulívi

Tað er Eysturoyar Vinnufelag, ið hevur tikið stig til Faroexpo 2005, og borgarstjórin í Runavíkar kommunu fegnast um, at slík stig verða tikin:

- Tað at vinnulívið setur fokus á samstarvsmøguleikar í sambandi við útflutning, tulki eg sum eitt seriøst útspæl frá vinnulívinum um at koma víðari í menningini, og tað haldi eg er at fegnas um, sigur Rodmund Nielsen.

Borgarstjórin sigur, at týdningurin av einum virknum vinnulívi er ovurhonds stórur, og í Eysturoynni hava tey fleiri dømi um, at fyritøkur hava sligið seg saman um okkurt arbeiði, soleiðis at tað ikki er gloppið teimum av hondum.

# Nógv fólk við Norrönu

**Hesar seinastu vikurnar hevur rættuliga nógv fólk ferðast við Norrønu samanborið við undanfarin ár, og á Smyril Line vænta tey eisini nógv ferðafólk bæði í heystfrítíðini og um jólini**

FERÐAFÓLKAFLUTNINGUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ár ið í ár sær út til at eydnast væl hjá Smyril Line. Herfyri kunngjørdi felagið, at ferðafólkatalið í summar var um 16 prosent hægri enn í fjør, og hagtølini fyri hesar seinastu túrarnar hjá Norrønu hava somuleiðis verið stak góð.




*Rættuliga nógv fólk hevur ferðast við Norrønu seinastu túrarnar, septembur mánaði hevur roynst stak væl í mun til undanfarin ár. Komandi leygardag fer Norrøna á sleipistøð í Danmark at umvæla stabilisatorararnar, og tí verður eingin sigling í eina viku.*
*savnsmynd*

### Tað sær gott út

Áki Jespersen, deildarleiðari á skipsdeildini hjá Smyril Line, sigur, at tað sær gott út fyri hesa ársins tíð.

- Mánadagin komu sløk 700 fólk hendan vegin við skipinum, og tá ið hon fer til Danmarkar seinni í vikuni, fer ferðafólkatalið at tátta í 600, greiðir Áki Jespersen frá.

Hann sigur, at hetta eru rættuliga góð tøl fyri septembur mánað. Somuleiðis sigur Áki Jespersen, at onkur annar túrur fyrr í hesum mánaðinum hevur roynst enn betur, og tá hevur ferðafólkatalið næstan verið uppi á 1000 fólkum, og tað er óvanliga gott.

Komandi leygardag, tá ið Norrøna kemur til Danmarkar, fer hon á sleipistøð, tí at stabilisatorararnir skulu umvælast. Tískil verður eingin ferðafólkasigling í døgunum frá 24. septembur til 1. oktobur, tá ið Norrøna er liðugt umvæld.

Smyril Line hevur eisini nøkur serlig tilboð í vetrarhálvarínum, sum fleiri útisetar ivaleyst fara at gera sær dælt av á jólum. Til ber nevnliga at koma aftur og fram millum Danmark og Føroyar fyri einans 500 krónur, og tað enntá í einum av betru kømurunum, um tú bíleggur tær ferðaseðilin í góðari tíð.

Áki Jespersen sigur, at ongar kamarstreytir eru í sambandi við tilboðið, og tí kanst tú, um tú bíleggur pláss tíðliga, kanska fá pláss í einum tvey-mans kamari við kúgveyga og kuldaskápi. Ivaleyst er hetta eitt tilboð, sum kemur væl við hjá fleiri av ungu føroyingunum, ið eru uttanlands í lestarørindum, og sum ætla sær heim á jólum.




## Flogskiparar til Atlantic Airways

Søkt verður eftir flogskiparum til flogførini hjá Atlantic Airways.

Krøv
Umsøkjarar skulu hava Commercial Pilot License (CPL), hava staðið prógv til Airline Transport Pilot License (ATPL) og Instrument Rating Multi Engine (IRME).

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. oktober 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast hjá Hans Hansen, flogovasta, á tlf. 21 31 72 ella e-mail: hans@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, att. Hans Hansen, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com